

# Prísurin á gulli og olju lækkar

Jógvan Hugo Gardar

20.07.2015 - 07:47

Oljan.fo

Í morgun kostar eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent millum 56,84 dollarar og 56,95 dollarar. Talan er um eina lække hetta seinasta samdøgurið.Samanborið við prísin á oljuni hesa farnu vikuna, so liggur hann í niðara enda, tí sveiggini hava ligið millum 56,38 og 58,81 dollarar fyri fatið av Brent farnu sjey dagarnar.

Amerikanska lættoljan WTI kostar í morgun umleið 50,90 dollarar fyri fatið, men hevur verið niðri á 50,63 dollarar.

Gullprísurin, ið eisini er ein ávísing um hvussu tað gongur búskaparliga, er í morgun lækkaður niður á sítt lægsta støðið farnu fimm árini. Gullprísurin lækkaði í morgun við 2,3 prosentum aftaná at jalig lyklatøl komu frá amerikansku myndugleikunum, og hetta ger at mett verður at amerikanske miðbankin kemur at hækka rentuna seinni í ár.